# Serstøk avtala

millum undirritaðu

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

og

**Kost- og Føðslufelagið**

er í dag gjørd avtala um, at kost- og føðslustarvsfólk, ið starvast á kommunala sáttmálaøkinum, til eina og hvørja tíð fylgja galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Kost- og Føðslufelagið.

§ 1

Partarnir eru samdir um, at øll leiðara størv á kommunala sáttmáløkinum og møgulig nýggj størv, sum bara eru at galda á kommunala sáttmálaøkinum, verða viðgjørd og flokkaði av pørtunum.

§ 2

Hendan avtala fær gildi tann 1. oktober 2017 og kann sigast upp við ein freist á 3 mánaðir til ein 1. oktober, fyrstu ferð tann 1. oktober 2020.

Tórshavn tann 22. mars 2019

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kost- og Føðslufelagið

# Flokkingaravtala

millum

# Kost- og Føðslufelagið

og

# Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

1. **Flokking av leiðarum**

   Partarnir eru samdir um, at leiðarastørvini á kommunala sáttmálaøkinum eru fylgjandi:

   Kostfakligur leiðari 1:
   - Leiðarin í køkinum á heiminum við Vágna í Norðoya bú- og heimatænastu
   - Leiðarin í køkinum á Sýnini í Vágum

   Kostfakligur leiðari 2:
   - Leiðarin í køkinum á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi
   - Leiðarin í køkinum á Lágargarði
   - Leiðarin í køkinum á Boðanesheiminum

   Partarnir eru samdir um, at niðan fyri standandi størv verða broytt til ikki at vera leiðarastørv. So leingi verandi starvsfólk røkja nevndu størv, verður teirra starvsheiti framhaldandi kostfakligur leiðari. Í starvstíðini halda hesi starvsfólk fram við *serstakari* og *persónligari* flokking.

   Fylgjandi størv verða broytt:
   - Leiðarastarvið í køkinum á Norðoya Ellis- og vistarheimi
   - Leiðarastarvið í køkinum á Sambýlinum á Heygnum í Norðoya Bú- og heimatænastu
   - Leiðarastarvið í køkinum á Røktarheiminum Áargarði á Sandi

Somuleiðis er fylgjandi leiðarastarv broytt frá kostfakligur leiðari 2 til kostfakligur leiðari 1:
- Leiðarin í køkinum á Sýnini í Vágum

**Serstakar og persónligar flokkingar av broyttu leiðarastørvunum**
- Leiðarastarvið í køkinum í Norðoya Ellis- og vistarheimi

  - 1. oktober 2017: stig 32
  - 1. oktober 2018: stig 34
  - 1. oktober 2019 og so leingi verandi starvsfólk eru í starvi: stig 36

- Leiðarastarvið í køkinum í Sambýlinum á Heygnum:
  - 1. oktober 2017: stig 36
  - 1. oktober 2018: stig 39
  - 1. oktober 2019 og so leingi verandi starvsfólk eru í starvi: stig 40

- Leiðarastarvinum í køkinum á Røktarheiminum Áargarði á Sandi
  - 1. oktober 2017: stig 36
  - 1. oktober 2018: stig 39
  - 1. oktober 2019 og so leingi verandi starvsfólk eru í starvi: stig 40

- Leiðarastarvið í køkinum á Sýnini í Vágum
  - Kostfakligur leiðari 1 á stig 41 frá 1. oktober 2018

Flokkingarnar taka støði í bygnaði dags dato umframt flokkingarkriterii í § 3 stk. 2 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Kost- og Føðslufelagið.

**2. Føðsluhjálpari**

Hanna Maria Poulsen, ið d.d. starvast sum føðsluhjálpari í Gøtubrá í Nánd, heldur fram við skalagongdini, ið var galdandi fram til 1. oktober 2017. Hetta er ein persónlig flokking, ið hon heldur fram við í verandi starvi.

**3. Gildiskoma**

Hendan avtala fær gildi frá 1. oktober 2017 og er tengd at galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Kost- og Føðslufelagið, ið fer úr gildi tann 1. oktober 2020.

Tórshavn 22. mars 2019

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kost- og Føðslufelagið